# Eysturkommunu býráð

## Býráðsfundur verður mánadagin tann 27. mars 2017 kl. 20.00

**Fundarskrá:**

1. **17/00092**
   **Umsókn um loyvi at leggja veg til matr. nr. 51b í Norðragøtu.**
   Umsókn er móttikin um loyvi at leggja veg frá Stallagøtu og inn á matr. nr. 51b í Norðragøtu. vegurin verður 3,0 m breiður.

   Umsitingin mælir til at umsøkjari fær loyvi at leggja veg inni á egna matrikul og binda vegin í Stallagøtu.

   Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at umsøkjarin fær loyvi at leggja vegin á matr. nr. 51b og gera íbinding við Stallagøtu.

2. **17/00123**
   **Sundurbýti av matr. nr. 169a í Leirvík – leiguøki til Sp/f El-teknik**
   Í sambandi við útstykking og bygging á Toftanesi, skal øki frábýtast til El-teknik sum hevur fingið byggiloyvi. Leigusáttmáli skal gerðast millum Eysturkommunu sum eigari og El-teknik sum leigari, leigusáttmálin ið verður gjørdur, er longri enn 10 ár.

   Sambært grein 17 Í LL nr. 64 frá 11. desember 1962 stk. 4 um matrikulering og sundurbýti v.m. skal undantaksloyvi gevast tá ið víddin av teimum frábýttu lutunum er minni enn 500 $m^2$.

   Umsitingin mælir til at fremja sundurbýti av matr. nr 169a til Sp/f El-teknik.

   Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at økið til Sp/f El-teknik verður sundurbýtt (matr. nr. 169a) og undantaksloyvi sambært grein 17 í LL nr. 64 frá 11. desember 1962 stk. 4 verður givið.

3. **17/00125**
   **Sundurbýti av matr. nr. 169a í Leirvík – leiguøki til Sp/f Svalir**
   Í sambandi við útstykking og bygging á Toftanesi, skal øki frábýtast til Sp/f Svalir sum hevur fingið byggiloyvi. Leigusáttmáli skal gerðast millum Eysturkommunu sum eigari og Sp/f Svalir sum leigari, leigisáttmálin ið verður gjørdur, er longri enn 10 ár.

   Sambært grein 17. Í LL nr. 64 frá 11. desember 1962 stk. 4 um matrikulering og sundurbýti v.m. skal undantaksloyvi gevast tá ið víddin av teimum frábýttu lutunum er minni enn 500 $m^2$.

   Umsitingin mælir til at fremja sundurbýti av matr. nr 169a til Sp/f Svalir.

   Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at økið til Sp/f Svalir verður sundurbýtt (matr. nr. 169a) og undantaksloyvi sambært grein 17 i LL nr. 64 frá 11. desember 1962 stk. 4 verður givið.

4. **17/00126**
**Sundurbýti av matr. nr. 169a í Leirvík – Tilbúgvingarstøð**
Kommunan ynskir at gera frábýti til bygging av Tilbúgvingarstøð (Brunastøð) sum er ogn hjá kommununi.

Umsitingin mælir til at fremja sundurbýti av matr. nr 169a til bygging av Tilbúgvingarstøð.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at økið matr. nr. 169a til Tilbúgvingarstøð verður sundurbýtt.

5. **17/00113**
**Umsókn um stuðul - Víkingur**
Umsókn frá Víkingi um stuðul.

Umsitingin mælir til at veita stuðul.

Mentanrnevndin tekur undir við tilmælinum og mælir til at veita Víkingi 400.000,00 kr. í stuðul.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

Peningurin verður tikin av konto 5.24.14.510-20 (stuðul til ítrótt)

6. **17/00140**
**1.viðgerð av eyakjáttan mars 2017**
Neyðugt er at veita eykajáttan til arbeiðir sum eru byrjaði í 2016, men sum ikki eru gjørd liðug. Harumframt er neyðug við eykajáttan til keyp av mart. nr. 89 í Leirvík, til keyp av innbúgvið til býráðshúsið og til stuðulsjáttan til kappróðrarfelagið.

Umsitingin mælir til at veita eykajáttanir á íalt kr. 8.345.000,00 kr, sambært fyriliggjandi yvirlitið.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan sambært fyriliggjandi yvirlitið.

Peningurin verður tikin av innistandandi.

7. **16/00422**
**Tannlæknaviðurskiftini í Eysturkommunu**

*Málið veður viðgjørt fyri afturlætnum huðrum.*